# – Vit eru vónbrotin av Smyril Line

**Kári P. Højgaard, virkandi formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, sigur, at kommunan hevur gjørt alt, sum myril Line hevur biðið teir um at gera í sambandi við atløguna hjá Norrønu í Saltangará**

SKIPAFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Vit kunnu bara bjóða okkum fram, sum vit alla tíðina hava gjørt. Norrøna hevur fleiri ferðir ligið her hjá okkum, og mær vitandi hevur samstarvið verið gott. Vit hava havt eftirmetingar og hava verið í dialogi við Smyril Line alla tíðina, sigur Kári P. Højgaard, sum vegna Runavíkar kommunu er ógvuliga vónbrotin av, at kommunan einki hava frætt um ætlaninar hjá Smyril Line at fara til Ánirnar við Norrønu*

Herfyri kom fram, at Smyril Line og Klaksvíkar kommuna eru í samráðingum um, at Ánirnar skulu verða alternativa havnin hjá Norrønu í vetur, tá mett verður, at ikki er atkomandi í Havn.

### Fylgja tilráðing

Í samrøðu við Portalin, segði Tummas Magnussen, stjóri í Smyril Line, at felagið hevur valt at fylgja tilráðingini hjá teirra skiparum sum siga, at Ánirnar eru besta alternativa havnin hjá Norrønu um veturin.

Stjórin sigur seg vænta, at avtalan millum Smyril Line og Klaksvíkar kommunu kemur upp á pláss um nakrar dagar.

Flestum kunnugt hevur Norrøna brúkt Runavíkar havn, tá ið ikki hevur verið atkomandi í Havn. Ein av gomlu skiparunum hjá Smyril Line, Ólavur Hovsgarð, hevur áður sagt, at Skálafjørðurin við Runavíkar havn eigur bestu havn í Føroyum.

Kári P. Højgaard er virkandi formaður í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, nú formaðurin, Klæmint Østerø, er burturstaddur.

### Undrast stórliga

– Okkum tykir hetta ógvuliga løgið. Mær vitandi hava vit verið í dialogi við Smyril Line um alternativa havn, og mær kunnugt hevur felagið als ikki vent sær til okkum um, at teir nú arbeiða við eini aðrari alternativari havn, nevniliga í Ánunum.

Kári sigur, at Runavíkar kommuna hevur gjørt alt, sum Smyril Line hevur biðið teir gera í samband við atløgu.

– Vit hava soleiðis gjørt nýggjar pullartar, sett vindmátara upp, og vit hava gjørt tað soleiðis, at ferðafólkini kunnu avgreiðast – og eisini tollavgreiðast.

Hann vísir á, at skal kommunan gera stórar íløgur við havnalagið, er sjálvandi neyðugt, at Smyril Line kann tryggja kommununi ein ávísan »regularitet« gjøgnum veturin, soleiðis at íløgurnar vinna seg innaftur.

### Misálit á fjørðin

– Men hóast Runavíkar havn hevur verið alternativið hjá Norrønu, hava vit einki petti hoyrt um, at Smyril Line nú arbeiðir við einum øðrum alternativi. Hetta harmar okkum almikið, og vit standa rættiliga spyrjandi.

Kári P. Højgaard heldur, at tað, sum er uppaftur verri í hesum sambandi, er, at felagið vísir til eina sonevnda tilráðing hjá skiparunum, sum mæla til Ánirnar.

– Hetta kann eisini skiljast sum ein ávís misálitisváttan á Skálafjørðin og Runavíkar havn sum trygg havn.

Og tað sigur virkandi havnanevndarformaðurin seg als ikki skilja, tí honum kunnugt hevur Skálafjørðurin altíð verið mettur sum tryggasta havnin í Føroyum.

– Eg haldi meg minnast, tá ið táverandi skiparin á Norrønu, Ólavur Hovsgarð, greiddi frá, hvussu fantastiska góð Runavíkar havn er til Norrønu.

### Meirkostnaður

Kári vísir á, at tað tekur bert ein hálvan tíma til trý korter hjá Norrønu at sigla av Havnarvág og inn á Skálafjørðin.

– Hinvegin skulu fólk við teirri loysn, sum nú verður arbeitt við, heilt norður til Ánirnar fyri at sleppa umborð á Norrønu, og tað má onkusvgegna hava meirkostnað við sær, tá ið neyðugt eisini verður at koyra í gjøgnum gjaldstunnil fyri at koma til og frá skipinum.

Og Kári heldur fram:

– Nei, eg skilji slett ikki hesa ætlan, og eg skilji enn minni, hvussu tað ber til, at Smyril Line ikki hevur kunnað Runavíkar kommunu um tað, sum nú er í umbúna – og eftir øllum at døma nú er við at verða undir landi.

Hann leggur dent á, at Runavíkar kommuna, sum áður hevur hýst Norrønu, einans hevur hoyrt hesi tíðindi sum slatur – og í miðlunum.

– Vit hava livað í teirri trúgv, at Runavíkar havn var alternativa havnin hjá Norrønu, sigur hann.

Men hevur Runavíkar kommuna møguleika at taka nøkur stig, nú tað vísir seg, at Smyril Line er við at venda kommununi bakið, spurdu vit havnanevndarformannin.

### Bjóða seg fram

– Vit kunnu bara bjóða okkum fram, sum vit alla tíðina hava gjørt. Norrøna hevur fleiri ferðir ligið her hjá okkum, og mær vitandi hevur samstarvið verið gott. Vit hava havt eftirmetingar og hava verið í dialogi við Smyril Line alla tíðina, sigur Kári.

Hann vísir á, at tá ið Norrøna seinast var fyri óhappið og skuldi koma inn á Skálafjørðin, fekk Runavíkar kommuna einki at vita, fyrr enn skipið nærkaðist Toftum.

– Tá lá ein stórur eysturlendskur trolarin við pierin, sum hevði trupulleikar við motorinum. Høvdu vit fingið eitt sindur longri skotbráð, høvdu vit funnið út av at loyst málið á ein annan og betri hátt, har vit høvdu flutt skipið. Norrøna gjørdi tá eina roynd at leggja at við oljubryggjuna, men hildið var, at vindurin var ov nógvur. Hetta er mær vitandi einastu ferð, at Norrøna hevur verið inni á Skálafjørðinum og ikki hevur fingið lagt til bryggju. Men tað hevði so eisini sína orsøk, sigur ein vónbrotin Kári P. Højgaard at enda.



*- Úttalilsini hjá stjóranum í Smyril Line, Tummasi Magnussen, kunnu skiljast sum ein ávís misálitisváttan á Skálafjørðin og Runavíkar havn sum trygg havn, sigur Kári P. Højgaard, virkandi havnanevndarformaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*